# Reglugerð um avriksflutning á Fróðskaparsetri Føroya

Góðkent í setursleiðsluni 21. februar 2023.

Ásett við heimild í kunngerð nr. 99 frá 17. juni 2021 um próvtøkur á Fróðskaparsetri Føroya, og kunngerð nr. 97 frá 17. juni 2021 um útbúgvingar á Fróðskaparsetri Føroya við seinni broytingum, verður her lýst reglugerð í samband við avriksflutning á Fróðskaparsetri Føroya.

Reglugerðin er galdandi fyri allar útbúgvingar á Fróðskaparsetri Føroya.

## 1. Endamál

Avriksflutningur (á enskum *credit transfer*) hevur til endamáls at tryggja flytføri av avrikum millum útbúgvingarstovnar og lond umframt flytføri av stakskeiðum tikin á øðrum útbúgvingum á Fróðskaparsetri Føroya. At tryggja flytføri er ein týðandi partur av Bologna-tilgongdini, sí "ECTS Users' Guide" (2015).

## 2. Avriksflutningur

Lesandi kunnu søkja avvarðandi lestrarráð um at fáa lokin skeið ella partar av útbúgving (námspartar) avriksflutt inn á útbúgvingina, ið tey eru innskrivað til á Fróðskaparsetri Føroya. Hetta merkir, at eitt ella fleiri skeið á útbúgvingini á Fróðskaparsetri Føroya verða góðskrivað, t.v.s. tann lesandi sleppur undan at fara til próvtøku á hesum skeiðum.

## 3. Grundleggjandi krøv til avriksflutning

Avrikið, ið søkt verður um at flyta, má vera á sama ella hægri stigi (t.d. bachelor ella master) sum teir partar av útbúgvingini, avrikið skal setast í staðin fyri. Harumframt mugu innihald, førleikar og læruúrtøkur, sum ásett í námsskipanini, vera sambærilig. Fakliga innihaldið skal eisini vera tíðarhóskandi.

## 4. Hvat kann verða avriksflutt

Umframt grundleggjandi krøvini til avriksflutning, skulu loknu skeiðini ella námspartarnir uppfylla minst eina av hesum treytunum:

- Talan skal vera um skeið ella námspartar av útbúgving, ið tann lesandi hevur staðið á øðrum viðurkendum hægri útbúgvingarstovni.
- Talan skal vera um skeið ella námspartar av útbúgving, ið tann lesandi hevur staðið á aðrari útbúgving á Fróðskaparsetrinum.
- Talan skal vera um skeið ella námspartar av útbúgving, ið tann lesandi hevur staðið í samband við eldri innskriving á somu útbúgving.

Avriksflutningur verður skrásettur sum "staðin" á próvtalayvirlitinum hjá tí lesandi.

Tað er í útgangsstøði *ikki* møguligt at avriksflyta skeið ella námspartar frá útbúgving, sum tann lesandi hevur gjørt lidna, og sum er á sama stigi sum útbúgvingin á Fróðskaparsetri Føroya, t.v.s. tað ikki møguligt at brúka somu ECTS til fleiri útbúgvingar á sama stigi. Heldur ikki er møguligt at avriksflyta bachelorritgerð á bachelorútbúgving og masterritgerð á masterútbúgving. Undantøk kunnu gerast, tá talan er um avriksflutning inn á útbúgvingar á Fróðskaparsetri Føroya, sum serliga stórur samfelagstørvur er á, tá talan er um einstøk grundleggjandi skeið ella tá onnur serlig viðurskifti tala fyri tí. Ein meting verður gjørd í hvørjum einstøkum føri.

## 5. Hvussu nógv kann verða avriksflutt

Tá tann lesandi er innskrivaður til útbúgving á Fróðskaparsetri Føroya er í útgangsstøði onki hámark fyri avriksflutningi inn á útbúgvingina. Tað eru altíð fakkøn/útbúgvingarleiðari, sum gera eina grundaða meting av, hvussu nógv er hóskandi at avriksflyta. Í serligum førum kunnu mørk fyri avriksflutningi tilskilast í námsskipanini fyri einstøku útbúgvingina.

## 6. Serligar reglur fyri skiftislestur

Lesandi, ið eru innskrivað til lestur á Fróðskaparsetri Føroya, kunnu sum oftast taka ein part av útbúgvingini sum skiftislestur á øðrum útbúgvingarstovni, t.d. sum lestrarvist. Í sambandi við skiftislestur skal tann lesandi fáa undangóðkent skeiðini, ið viðkomandi skal taka á øðrum útbúgvingarstovni. Skiftislestur er vanliga í mesta lagi 60 ECTS – alt eftir, hvat tann lesandi hevur fingið undangóðkent, og hvørjar ásetingar eru í námsskipanini fyri einstøku útbúgvingina.

## 7. Serligar reglur fyri uttansetursundirvísing

Fróðskaparsetur Føroya kann gera avtalur um samstarv um undirvísing við aðrar hægri útbúgvingarstovnar. Í mesta lagi 60 ECTS av bachelorútbúgving og 30 ECTS av masterútbúgving kunnu takast uttanseturs. Í serligum førum kann frávik gerast frá ECTS-kravinum, sum landsstýrismaðurin tekur støðu til, men meir enn helvtin av eini útbúgving kann ikki vera uttanseturs. Uttansetursundirvísing er lýst í námsskipanini fyri útbúgvingina, og lesandi skulu ikki søkja um avriksflutning í sambandi við uttansetursundirvísing, men fáa loknu skeiðini góðskrivað beinleiðis.

## 8. Fyrning av skeiðum

Avrik, sum verða mett at vera ov gomul og/ella ótíðarhóskandi, kunnu ikki flytast. Undantak kann gerast, tá umsøkjarin hevur arbeitt støðugt innan fakøkið, sum avrikini fevna um. Útbúgvingarleiðarin metir um avrikini í hvørjum einstøkum føri, men sum útgangsstøði verður mett, at eitt avrik er ov gamalt 7 ár eftir, at tað er lokið.

## 9. Kæruvegleiðing

Noktandi ella á annan hátt avmarkandi avgerðir um avriksflutning skulu hava vegleiðing um, at avgerðin kann kærast til avvarðandi landsstýrismann innan 4 vikur eftir, at avgerðin er fráboðað. Møgulig kæra skal skrivliga sendast Fróðskaparsetri Føroya, ið sendir kæruna víðari til landsstýrismannin saman við sínum ummæli av málinum. Áðrenn málið verður sent landsstýrismanninum, skal Fróðskaparsetur Føroya geva kæraranum høvi til, innan 7 dagar, at gera viðmerkingar til ummælið. Møguligar viðmerkingar hjá kæraranum skulu sendast landsstýrismanninum.